

# Slóðbrótandi donsk íssigling í Arktis

**Jan Müller**

22.09.2013 - 13:59

Oljan.fo

Eitt danskt farmaskip er sum tað fyrsta nakrantíð ávegis gjøgnum útnyrðings siglingarleiðina, sum gongur norður um Kanada og bindur saman Atlantshavið og Kyrrahavið.

Hetta skrivar Jyllandsposten. Tað er danska reiðaríið Nordic Bulk Carriers, sum eigur skipið og skilst, at alt gongur eftir ætlan.

"Tað gongur væl, og skipið er komið í helvt gjøgnum siglingarleiðina," sigur Christian Bonfils, stjóri við blaðið.

Skipið byrjaði ferðina í Vancouver í Kanada og skal til Finlands. Tað er lastað við 73.500 tonsum av koli. Sum skilst, so hevði danska reiðaríið ikki tikið stig til hesa ferðina, um man ikki roknaði við at klára tað uttan trupulleikar.

Skipið MV Nordic Orion er 75.604 tons deyðvekt. Tað er 225 metrar langt og í ísklassa 1A. Tað kann lasta 73.500 tons , sum er 15.000 tons meira enn tað kann hava umborð gjøgnum Panamaveitina.

Danska reiðaríið vil við hesi siglingini vita, um tað ber til at sigla henda teinin ein part av árinum. Teinurin sigldur verður er 1850 km stytri enn um farið varð gjøgnum Panamaveitina. Harvið ber til at spara bæði tíð og brennievni. Felagið sparir umleið eina hálva mill. kr. í brennievni.

Mynd: Nasa/Wikimedia Common